


prógva fyri nøkrum, at kvinnur væl kunnu gera sama arbeiði sum menn:

– Eg geri tað bara, tí eg havi hug til tað, sigur Gunnhild, sum higartil hevur verið fýra túrar við Brimli.

Í løtuni nýtur Gunnhild bara lívið umborð, men væntar tó ikki, at dekkarayrkið verður hennara lívsleið:

– Eg fari helst at fáa mær eina útbúgving, sigur Gunnhild, og hon dylur ikki fyri, at hon somuleiðis hevur hug til at royna eina rúgvu av øðrum tingum, áðrenn lesnaðin, hóast tað eru fýra ár síðan, hon varð studentur:

– Nú er skjótt tíð uppá at fara at lesa aftur. Men hóast eg havi hug til at royna ymiskt, gevur sjólívið mær somuleiðis íblástur til at fara at lesa aftur. Umborð havi eg tíð til at hugsa um lívið og fái tískil hug til at menna meg á aðrar hættir, sigur hon.

*Gunnhild heldur, at mannfólk ofta hava hug til at gera alt fyri kvinnuna, men soleiðis er tað ikki umborð:*
*- Í roynd og veru geri eg alt tað sama sum menninir umborð, sigur Gunnhild.*

## Arbeiðsdagurin langur

Gunnhild arbeiðir heilar 12 tímar um dagin, og tað heldur hon er ein vanasak:

– Eg vandi meg alt fyri eitt til at arbeiða 12 tímar um dagin. At vera dekkari er ikki hart kropsligt arbeiði. Tá eg eitt nú havi vakt á brúnni, siti eg at kalla bara og hyggi út á sjógv. Men nú skal tað heldur ikki ljóða, sum at eg keði meg og eri um at sovna. Tí tað er næstan altíð okkurt at gera. Til tíðir kann tað eitt nú vera sera spennandi at læra seg at brúka tólini á brúnni og hyggja at, hvussu teir kønu menninir umborð gera.

## Robustur ævintýrari

Tað er ikki fyrstu ferð, Gunnhild ger okkurt øðrvísi enn kvinnur flest.

– Eg eri als ikki banggin fyri at gera okkurt øðrvísi. Eitt nú havi eg gingið á tekniska skúla, lagt rør fyri Nomatek, siglt við skúlaskipi og nomið mær útbúgving á verkstaðarskúla í Danmark, har eg eitt nú lærdi at sveisa, sigur Gunnhild, ið somuleiðis hevur tikið dugnaskapsskeið í sigling, dagliga hjálpt pápa sínum við umvælingum í súkkluhandlinum í Klaksvík, og alt sítt lív verið skóti.

Men Gunnhild hevur ikki bara fingist við robust mannfólkaarbeiði. Hon er nevniliga eisini ein lítil og strálandi ævintýrari. Millum annað hevur hon verið í Suðuramerika, siglt um Atlantshavið við seglskipi (skúlaskipinum Danmark), verið á interrail í Evropa, aupair í Íslandi, lisið íslendskt á Háskúla Íslands og verið á háskúla í Svøríki. Og sum vit sóu í bløðunum í síðstu viku, so er Gunnhild í løtuni á St. Kilda við bátinum hjá Hávardi Enni, Enniway:

## Gott arbeiði

Gunnhild dámar væl at arbeiða sum dekkari. Og umborð á Brimli eru nógv fitt fólk og samanhaldið er frálíkt, hóast aldursmunurin er stórur. Umframt Gunnhild, arbeiða tveir aðrir ungir menn umborð á Brimli:

– Í frítíðini sita vit og hugna okkum saman: práta og hyggja í sjónvarp.

Tá søkt var í bløðunum eftir manning til Brimil og Tjaldrið fyrst í ár, vóru heili 94 umsøkjarar. Gunnhild var millum tey seks hepnu og fekk starvið alt fyri eitt:

– Tey flestu, sum søktu, vóru mannfólk. Eg var helst millum tey hepnu, tí eg frammanundan hevði royndir á sjónum, og møguliga eisini tí eg eri kvinna, og menn altíð royna at ganga inn fyri javnrætti, sigur Gunnhild at enda við einum brosi.







*Foreldrini Andras og Anna siga dóttrini farvæl fyrsta túrin*

## FAKTA

Arbeiðsdagarnir hjá Gunnhild umborð á Brimli eru ymiskir. Eitt nú sær ein arbeiðsdagur hjá henni soleiðis út:

- Frá klokkan 8-12: Vakt á brúnni
- Frá klokkan 12-16: Vakt á dekkinum
- Frá klokkan 18-20: Frí
- Frá klokkan 20-00: Vakt á brúnni
- Frá klokkan 00-8: Frí